UTTAN ÚR HEIMI

# Væntar sama óskilið



Vit kunnu vænta sama óskil á forsetavalinum í Florida hesaferð, heldur fyrrverandi forsetin Jimmy Carter.

Valskipanin í amerikanska statinum Florida er framvegis so vánalig, at tað ber stutt sagt ikki til at avgreiða eitt rættvíst val har.

Tað heldur fyrrverandi forsetin Jimmy Carter. Hann ásannar, at myndugleikarnir hava gjørt ávísar ábøtur á skipanina síðani gøluvalið fyri fýra árum síðani, men tað er framvegis ikki nóg gott, sigur hann.

– Nógv bendir á, at vit kunnu vænta sama óskilið sum í 2000, skrivar Carter í einari grein í blaðnum Washington Post.

Carter skrivar, at grundleggjandi altjóða krøv til eitt rættvíst krav eru ikki uppfylt í Florida. Hann veit, hvat hann tosar um, tí hann hevur verið altjóða valeygleiðari í fleiri ár.

Sjálvur heldur hann, at ein óheft nevnd eigur at hava ábyrgdina av valinum í Florida, og at allir borgararnir fáa somu møguleikar. Hann heldur, at Kathrine Harris, sum stóð fyri valinum í Florida í 2000, var ikki óheft, og at Glenda Hood, sum hevur tikið við, hevur ov tæt tilknýti til republikanska flokkin.

Carter finst eisini at guvernørinum í Florida, Jeb Bush. Hann og George W. Bush, forseti, eru brøður, og Carter heldur, at guvernørurin hevur gjørt alt ov lítið fyri at fáa viðurskiftini við valskipanini í rættlag.

# Irakar fáa tilboð



Í Danmark ætlar stjórnin at taka stig til at fáa fleiri irakar, sum flýddu undan stýrinum hjá Saddam Hussein, at flyta heimaftur.

Í seinastuni hava embætisfólk í innflytara- og menningarmálaráðnum arbeitt við at fyrireika eitt tilboð til tey iraksku flóttafólkini. Sambært Politiken er ætlanin, at irakararnir skulu fáa tilboð um fíggjarligan stuðul úr danska ríkiskassanum umframt pengar, sum skulu nýtast til at endurreisa tað økið, sum teir búseta seg í. Sum skilst er ætlanin at venda aftur til eina skipan, sum var í gildi í fjør, og sum gav irakum 18.000 krónur um mánaðin, vildu teir fara heimaftur.

607 iraksk flóttafólk, sum eru í Danmark, hava fingið at vita, at tey fáa ikki uppihaldsloyvi, og Danski Fólkaflokkurin hevur hótt við at fella fíggjarlógaruppskotið fyri næsta ár, ger stjórnin ikki okkurt munagott fyri at fáa irakararnar at venda heimaftur.

# Fiskur var kokain

Amerikanska sjóverjan gjørdi kvettið, tá hon fyrr í mánaðinum sendi menn umborð á tvey fiskiskip at kanna veiði og reiðskap.

Bæði skipini vóru í Kyrrahavinum. Fyrst setti sjóverjan menn umborð á skipið "Lina Maria", sum var statt góðar 200 fjórðingar í útsynning úr Galapagosoyggjunum, og seinni fóru menn umborð á "San Jose", sum bleiv steðgað í ein útsynning úr meksikonsku strondini.

Tað vísti seg, at skipini høvdu 27 tons í lastini - ikki av fiski, men av rúsevninum kokaini. Báðar manningarnar, 18 mans, sita nú í varðhaldi, og myndugleikarnir hava lagt hald á bæði skipini.

# Bush og Kerry í venjingarlegu





*Fyri fyrstu ferð hittast Bush og Kerry í einum sjónvarpsdysti. Úrslitið kann fáa stóran týdning fyri valúrslitið*

**Í annaðkvøld verður tann fyrsti av trimum sjónvarpsdystum ímillum tey bæði forsetavalevnini**

VALSTRÍÐ
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tær seinastu vikurnar hava George W. Bush og John Kerry ferðast USA runt fyri at tryggja sær undirtøku frá veljarunum á valinum í november. Men teir seinastu dagarnar hava valbussarnir staðið stillir, tí valevnini hava fyrireikað seg til tann fyrsta av teimum sera týðandi sjónvarpsdystunum.

Dysturin verður í annaðkvøld, og kanningar onnur ár hava víst, at tað r serliga tí fyrsta dystinum, fólk hyggja eftir. Tað hevur eisini stóran týdning, sum hvussu valevnini standa seg, tí sambært einari nýggjari kanning siga heili 69 prosent av teimum spurdu, at sjónvarpsdysturin kann vera avgerandi fyri, hvønn tey velja.

Tíðarritið Time vil vera við, at Bush hevur fyrireikað seg til sjónvarpsdystirnar í fleiri mánaðir, og blaðið veit eisini at siga, at forsetin hevur lurtað eftir einum hópi av røðum, sum Kerry hevur hildið.

Eisini John Kerry hevur fyrireikað seg, men hann hevur kortini tikið sær stundir til at halda einstakar veljarafundir.

Kerry ber orð fyri at duga væl at orðføra seg í einum kjaki, og hann var eisini virkin í einum kjakfelagsskapi, tá hann las á lærda háskúlanum Yale. Annars høvdu hann og Bush sama lærara í júst kjaki.

# Svik við OL-pengum

**Beijing verður vertur fyri teimum olympisku leikunum um fýra ár, men ein frágreiðing avdúkar, at OL-pengar eru brúktir til mong endamál**

SVIK
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Kinesiski ríkisgrannskoðarin, Li Jinhua, hevur av álvara fest í fjúsið.

Í einari frágreiðing, sum hann skrivaði í summar, men sum ikki er komin fyri almenningin fyrr enn nú, skrivar Li Jinhua, at svik og fíggjarundandráttur eru vanlig innan umsitingina í 41 av teimum 55 kinesisku stjórnarráðstovunum.

Eitt nú er hann komin fram á umfatandi svik í sambandi við arbeiðið at byggja ein ringveg rundan um kinesiska høvuðsstaðin. Sambært fjølmiðlunum er leiðarin fyri verkætlanini skuldsettur fyri at hava stungið ovurstórar upphæddir í egnan lumma, og harafturat skal hann hava latið skyldfólki og vinum nógvar pengar burtur av almennu játtanini til vegarbeiðið.

Í 2008 verða teir olympisku summarleikirnir í Beijing, og býurin hevur gjørt nógv burtur úr at vísa seg sum ein nútímans høvuðsstað. Men sambært frágreiðingini hjá Li Jinhua, ríkisgrannskoðara, er alt ikki líka ljósaeytt. Hann vil vera við, at nógvir pengar, sum eru settir av til at fyrireika leikirnar, eru endaðir aðrastaðni. Í frágreiðing hansara stendur, at nevndin, sum fyrireikar leikirnar, hevur stungið meiri enn 13 milliónir dollarar í egnan lumma. Ein stóran part av pengunum hevur nevndin brúkt til at byggja nevndarlimunum egin hús.

Kinesiskir eygleiðarar siga, at avdúkingarnar koma Hu Jintao, forseta illa við, tí hann hevur lagt stóran dent á at koma tí almenna svikinum til lívs.



# Hitt almenna ynskir greiðari rokningar

**Rokningar til hitt almenna skulu frameftir avgreiðast skjótari og uttan at fara við ov nógvari arbeiðsorku. Tí er neyðugt, at rokningarnar, sum verða sendar almennum stovnum verða greiðari**

FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
*Tíðindaskriv*



*Rokningarnar til tað almenna skulu nú gerast greiðari og meira eintýðugar*

Hvønn dag avgreiða almennir stovnar umleið 350 rokningar fyri vørur og tænastur, sum hitt almenna keypir. Nógv arbeiðstíð og orka fer til at avgreiða rokningarnar.

Nú ætlar Fíggjarmálaráðið tó, at viðgerðin av rokningum skal effektiviserast, so umsitingin av økinum gerst minni og at goldið verður til tíðina.

Men hóast skilagóðar loysnir, so er veruleikin, at nógv tíð fer til at avgreiða rokningar, sum eru ógreiðar og vanta grundleggjandi upplýsingar. Tí er neyðugt, at rokningar, sum koma til tað almenna, verða greiðari.

## Ójavnar rokningar

Ógvuliga stórur munur er á sjálvum rokningunum, sum skulu avgreiðast. Í øðrum endanum eru rokningar, sum hava allar neyðugar upplýsingar, eru snøggar og greitt uppsettar, og í hinum endanum eru rokningar, ið eru hondskrivaðar og vanta grundleggjandi upplýsingar. Ein stórur partur av øllum rokningum liggur onkustaðni millum hesar báðar pólarnar.

– Ógreiðar rokningar krevja lutfalsliga nógv arbeiði, og tað leingir avgreiðslutíðina. Sjálvandi ger hetta eisini umsitingina dýrari í síðsta enda, sigur Leif Abrahamsen, stjóri á Gjaldstovuni.

## Greiðari rokningar

Um avgreiðslutíðin skal avmarkast, er neyðugt, at Gjaldstovan beinanvegin kann skráseta krøv, sum landið skal rinda, í skipanini hjá landinum. Skipanin er lærd upp at kenna tær ymsu rokningarnar, sum virkini brúka. Tað ber í sær, at næstu ferð ein rokning verður móttikin, verður hon ljóslisin (skannað) og skrásett sjálvvirkandi. Síðan verður rokningin beind til rætta viðkomandi í talgildaðum (digitalum) formi.

"Tá allir stovnar undir landinum eru við í skipanini, er ein annar fyrimunur, at Fíggjarmálaráðið til eina og hvørja tíð hevur fult yvirlit yvir, hvørjir stovnar ikki avgreiða rokningar til tíðina, og kann seta neyðug tiltøk í verk", sigur Leif Abrahamsen, stjóri á Gjaldstovuni.

Ein avgjørd treyt er tó, at fyritøkur senda inn væl uppsettar og greiðar rokningar, sum hava allar neyðugar upplýsingar. Tí heitir Fíggjarmálaráðið í hesum døgum á teir veitarar, sum senda tí almenna rokningar fyri vørur og tænastur, um at uppfylla ávís formkrøv.

## Nýggju formkrøvini

Fíggjarmálaráðið hevur gjørt eitt yvirlit yvir krøvini, sum frameftir verða sett rokningum, ið skulu avgreiðast. Yvirlitið við teimum týdningarmestu formkrøvunum sær soleiðis út:

- Rokningin skal verða prentað ikki skrivað við hond
- Rokningin skal hava eitt V-tal. Um talan er um eitt partafelag, skal P/F-nummarið eisini standa á rokningini
- Dagfesting skal prentast á rokningina
- Rokningin skal hava eitt eintýðugt rokningarnummar
- Rokningin skal hava ein falldag, t.d. 30 dagar
- Kundanummarið skal verða prentað á rokningina
- Er grundarlagið undir keypinum ein rekvisitión ella innkeypsordi, skal verða víst eintýðugt til nummarið á rokningini.
- Navnið á tí, sum hevur umbiðið vøruna, skal við á rokningina.
- Best er, um rokningin er prentað á hvítt pappír uttan prýði, kassar o.a.t.

Ein stórur trupulleiki er, at fleiri fyritøkur brúka rokningar, sum eru prýddar í bakgrundini við litum, myndum og køssum. Hetta órógvar sjálvvirkandi ljóslesingartilgongdina, og tí er best, um rokningar til landið eru prentaðar á hvítt pappír uttan prýði og annað tílíkt.

Samstundis, sum hitt almenna nú ynskir greiðari rokningar á pappíri, er greitt, at fyrireikingar verða gjørdar, soleiðis at takast kann móti talgildum (digitalum) rokningum.

Seinni í ár verður eisini ein fráboðan send út um, at rokningar til almennar stovnar skulu sendast beinleiðis til Gjaldstovuna. Ein serlig fráboðan verður send út um hetta. Fíggjarmálaráðið fer eisini seinni at gera eitt rundskriv um gjaldstreytir.

# Innlit í fíggjarviðurskifti

**Ein føroysk-donsk embætismannanevnd hevur nú tilevnað ásetingina um innlitið, ið Landsstýrið ætlandi í hesi tingsetuni skal fáa í føroysk peningastovns- og fíggjarviðurskifti. Innlitið skal latast á sama hátt, sum danskir myndugleikar í dag fáa innlit frá Fíggjareftirlitinum**

INNLIT
*tíndaskriv*

Innlit, upplýsingar og dagføring. Hetta eru viðurskiftini, ið verða viðgjørd í einari føroyskari-danskari embætismannanevnd, sum hósdagin hevði fund í Føroyum. Umboð fyri Fíggjarmálaráðið, Vinnu- og –búskaparmálaráðið og Fíggjareftirlitið eru við í nevndini.

Nevndin arbeiðir við at útvega Landsstýrinum neyðugu heimildina, so at Landsstýrið kann fáa innlit í føroysk peningastovns- og fíggjarviðurskifti. Arbeiðið, sum í seinasta lagi skal verða liðugt um ársskiftið, er nú komið so mikið á leið, at ásetingin um innlit er tilevnað.

Semja er um, at Landsstýrið skal fáa upplýsingar um møguligar trupulleikar í føroyskum peningastovnum so skjótt sum til ber. Tað merkir, at innlit fæst, eftir at Fíggjareftirlitið hevur gjørt sínar niðurstøður, og tær eru, at trupulleikar eru staðfestir í stovnum í føroyska fíggjarumhvørvinum. Semjan merkir, at Landsstýrið fær fráboðanina eins skjótt og avvarðandi danskir myndugleikar.

Semjan í nevndini ber eisini í sær, at ein føroyingur, sum er serfrøðingur í føroyskum fíggjarviðurskiftum, skal knýtast til Det Finansielle Virksomhedsråd. Ráðið er partur av Fíggjareftirlitinum, og tekur m.a. allar prinsipiellar avgerðir hjá eftirlitinum. Føroyski serfrøðingurin skal veita ráð, tá føroysk mál koma á dagsskrá hjá Det Finansielle Virksomhedsråd.

Føroyska-danska embætismannanevndin arbeiðir eftir avtalu millum Bárð Nielsen, landsstýrismann við fíggjarmálum, og Bent Bendtsen, vinnu- og búskaparráðharra. Hon er nú farin undir at greiða spurningin, um Fíggjareftirlitið kann lata Landsstýrinum innlit og upplýsingar við einum sonevndum ríkislógartilmæli, ella um neyðugt er at broyta donsku lóggávuna á økinum.

Landsstýrið hevur eisini sett sær fyri, at føroyskar lógir á fíggjarøkinum skulu dagførast nógv skjótari enn í dag. Fyri at røkka hesum máli, arbeiðir føroyska-danska embætismannanevndin við at leggja ein leist fyri, hvussu dagføringin skal fara fram. Grundleggjandi er semja um, at Fíggjarmálaráðið, peningastovnarnir og Fíggjareftirlitið javnan og støðugt skulu hava samband hvør við annan, soleiðis at partarnir allatíðina kunnu skifta orð um dagføringar av lógargrundarlagnum.

Í hesum sambandi kann nevnast, at Landsstýrið í hesi tingsetuni fer at skjóta upp fyri Løgtinginum, at "lov om finansiel virksomhed" verður sett í gildi í Føroyum. Lógin er ein tvørgangandi lóg fyri fíggjarøkið, og kemur í staðin fyri ávikavist; "lov om banker og sparekasser"; "lov om fondsmæglerselskaber"; "lov om investeringsforeninger" og "lov om sparevirksomhed". Harafturat hevur lógin ásetingar um "udstedere af elektroniske penge". Umframt at dagføra lógarverkið á økinum, fer lógin at gera lógarverkið einfaldari.


Seinasta freist at lata broytingar inn til telefonbókina 2005 er mánadagin 1. nov. 2004




**Í mars 2005 verður telefonbókin borin út til allar fastnetstelefonfelagar í Føroyum. Virki, handlar og stovnar skulu boða frá av nýggjum, um lýst verður í Gulu síðum. Boðast skal eisini frá, um verandi lýsing ynskist við óbroytt.**

**Hvítu síður**

Mánadagin 1. november 2004 er seinasta freist, at koma við rættingum til Hvítu síður í telefonbókini fyri ár 2005 (vanliga telefonyvirlitið). Rættingarblað til Hvítu síður er á síðu 660 í telefonbókini 2004,og skal sendast til: Kundaskráseting, Føroya Tele, Postboks 27, FO-110 Tórshavn ella faks 31 93 01.

**Eykaupptøkur v.m.:**
Umframt rættingar til navn, bústað, telefonnummar, o.s.fr. ber eisini til at gera nakað serligt burturúr júst tínum telefonnummari, við undirstrikingum, eykaupptøkum og undirupptøkum. Prísurin er 62,50 kr. (íroknað mvg) fyri hvørja undirstriking, eykaupptøku ella undirupptøku.

**Búmerki:**
Eisini ber til at umbiðja búmerki í Hvítu síðum. Prísurin fyri búmerki er 2.000,00 kr. (ikki íroknað mvg) fyri hvørja upptøku.

**Gulu síður**

Mánadagin 1. november 2004 er seinasta freist at boða frá **av nýggjum**, um upptøka ynskist í Gulu síðum.

**Prísir:**
(A) Standardlýsing ................................ kr. 700,00
(B) Innramming .................................... kr. 800,00
(E) Grafisk lýsing pr. mm (min. 30 mm) . kr. 25,00
(sí dømi á s. 658 í Telefonbókini 2004)

**Litlýsingar:**
Umframt vanligar svart/gular lýsingar, er eisini møguleiki at lýsa við hvítari bakgrund og við litum. Eykakostnaður fyri hvíta bakgrund er kr. 500,00 og fyri litir við hvítari bakgrund kr. 1.250,00.
Skrásetingar-/Rættingarblað til Gulu síður er á síðu 659 í telefonbókini 2004, og skal sendast til:
Føroya Tele, Postboks 27, FO-110 Tórshavn, ella faks 32 11 66.
**GG: Prísirnir á Gulu síðum eru uttan mvg!**

tel 30 30 30 www.tele.fo www.nummar.fo · info@nummar.fo - www.gulu.fo · info@gulu.fo FØROYA TELE